# Mál- og avrikssáttmáli

# millum

# Suðuroyar sjúkrahús og

# Heilsumálaráðið



# 2014

Hesin mál- og avrikssáttmáli, millum Suðuroyar sjúkrahús og Heilsumálaráðið, er galdandi frá 1. januar til 31. desembur 2014. Sáttmálin fevnir um núverandi og framtíðarætlandi virksemi á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Mál og avrik verða gjøgnumførd í mun til ta manning og fíggjarorku, ið stovnurin hevur, soleiðis at skilja, at sáttmálin skal verða realistiskur, og at gjørligt skal verða at eftirkanna, um mál og avrik eru rokkin, serliga við atliti til viðgerðir og kanningar v.m.

Nú ætlanin er at leggja eldraøkið út til kommununarnar, má avgerast, hvussu samraksturin millum Suðuroyar sjúkrahús og Suðuroyar ellis-& røktarheim skal verða í framtíðini.

Suðuroyar sjúkrahús vil til, eina og hvørja tíð, royna at betra um nøgdsemi hjá brúkarunum, so øll skulu kenna seg trygg at venda sær til og nýta.

Sjúkrahúsið arbeiðir tí fram ímóti

- at hava so nøgd viðskiftafólk sum gjørligt
- at hava nøgd starvsfólk, ið skulu kenna stoltleika við at arbeiða á stovninum
- altíð at kunna nøkta akuttfunktiónina fyri Suðuroynna.

## Missión:

At veita eina trygga og dygdargóða heilsutænastu, á høgum fakligum støði, at menna og útbúgva okkara starvsfólk so sjúklingurin altíð verður í fokus, og at vit eisini kenna okkara ábyrgd, um sjúklingurin verður sendur til onnur sjúkrahús, innanoyggja ella uttanlands, til viðgerðar.

## Visjón:

Vit vilja stremba eftir at veita eina so virðiliga kanning, viðgerð og røkt sum gjørligt, eftir teimum fíggjarligu umstøðunum, í samstarvi við sjúklingin og tey avvarðandi, har sjúklingurin altíð skal verða í fokus, og har starvsfólk og onnur viðskiftafólk skulu føla seg nøgd við okkara avrik.
Starvsfólkini skulu kenna stoltleika av at starvast á Suðuroyar sjúkrahúsi, ið veitir góða og álítandi tænastu, har sjúklingurin altíð er í fokus.
Suðuroyar sjúkrahús er ein tænastudepil, ið allir borgarar í landinum skulu kunna kenna seg tryggar og vælkomnar at nýta

## Fyritreyt og fokus:

Skulu málini og visjónirnar røkkast er neyðugt, at vit áhaldandi fokusera á at fáa so góðar sjúklingagongdir við sjúklingin og avvarðandi. Hetta krevur so aftur, at starvsfólkini fáa høvi at koma til eftirútbúgvingar innan teirra serøkið.

## Generelt

Í hesum sambandi skal verða víst á, at starvsfólkatalið ikki er økt men í staðin minkað tey seinastu 10 til 15 árini.

## Yvirskipaði mál og átøk fyri 2013

| Mál | tí gera vit | Liðug | Ábyrgd |
|---|---|---|---|
| Umskipan av serviðgerð uttanlands | Farast skal undir at rótfesta fíggjarligu ábyrgdina av sjúkrahúsinum og at skipa fíggjarstýringina á økinum. | 30.04.2014 | SS/LS/KS/HMR |
| Rtg. konsulentar | Umráðandi er at fáa hesa skipan aftur at virka sum skjótast. | 1.2.2014 | SS/HMR |
| Konsulentavtalur | Arbeitt verður miðvíst við at fáa konsulent-avtalur. | 31.12.2014 | SS/HMR |
| THS skipanin | Nú dagføringin av Cosmic gevur møguleikar fyri hesum, skal arbeiðast fram í móti at fáa intigreraða digitala diktering. | 31.12.2014 | SS |
| Bíðilistar | Arbeiðast skal fram í móti, at tað ongantíð skal verða longri enn 6 vikur bíðitíð innan skurðøkið. | 31.12.2014 | SS |
| Samstarvsavtala millum sjúkrahúsini | Arbeiðast skal framhaldandi við samstarvsavtaluni við LS, við serligum atliti til at fáa distrikt-psykiatriina upp at virka. | 31.12.2014 | SS/LS/KS/HMR |
| Samstarv við primær-sektorin | SS skal saman við HMR, arbeiða fram ímóti størri samstarvi við primærsektorin, við atliti til uppskotið um heilsunýskipan. | 31.12.2014 | SS/HMR |
| Privatviðtala | Fáa greið viðurskifti um privatpraksis á sjúkrahúsinum. | 31.12.2014 | HMR/SS |
| Nýtt virksemi | Arbeiðast skal fram í móti at fáa fleiri skurðviðgerðir fyri at spara á uttanlandskontuni. | 31.12.2014 | SS |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orkusparing | Farast skal undir ítøkiliga roynd at fáa framt orkusparing, í fyrsta umfari serliga innan elnýtsluna. | 31.12.2014 | SS |
| Trygd og dygd | Fáa sett innanhýsis arbeiðsbólk, ið skal byrja tilgongdina til eina akkreditering av sjúkrahúsinum. | 31.12.2014 | SS |

**Fyri 2014 hevur Suðuroyar sjúkrahús hesi mál fyri ymisk lyklatøl**

| | M2013 | M2014 |
|---|---|---|
| Innleggingar | 1.000 | 900 |
| Skurðviðgerðir | 350 | 400 |
| Barnsburðir | 40 | 30 |
| Røntgenkanningar | 2.000 | 2.400 |
| Rannsóknarstovu-kanningar | 80.000 | 90.000 |
| Fysiurgiskar viðgerðir | 15.000 | 7.000 |
| Diabetes amb. | ? | 700 |

**Onnur mál:**

| Mál | tí gera vit | liðug | Ábyrgd |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald av bygningunum hjá sjúkrahúsinum | Gera raðfesting og íløgutørv á bygningunum. | Játtanin er flutt til Landsverk. Leiðslan er enn ikki kunna um nakra ætlan fyri 2014. | **SS/LV** |

Verða fortreytirnar munandi broyttar, eftir at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, um partarnir eru samdir um tað.

**Sáttmálaskeið**

Sáttmálin er galdandi fyri árið 2014.

Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum umleið á heysti 2014.

Tvøroyri, tann 2014

| | |
|---|---|
| Suðuroyar Sjúkrahús | Heilsumálaráðið |
| Ronnié Midjord, sjúkrahússtjóri | Turið Arge, aðalstjóri |